# ursharrin




meira upptikin av teimum, ið vóru saman við honum.

– Eg skuldi ansa eftir Gosvig og Hafsteinni, tí teir kundu gerast ein hóttan. Leingi vóru ikki tey stóru álopini, tí tað tóktist, sum allir bíðaðu, til Oyggjarvegurin kom. Tá legði eg meg bara sjálvur á odda, so eg kundi hava tamarhald á støðuni, og tá eg so var sloppin frá teimum báðum kappingarneytunum, royndi at at fáa hinar fimm frammanfyri aftur, men tað gekk ikki, sigur Torkil, ið helt tað vera eitt sindur torført at súkkla í gjár, tí sýnið var so vánaligt.

– Tað var ringt sýni tað nógva av teininum. Oman í Mjørkadal, har ferðin gjarna kann verða nógv, sá eg ikki nógv meira enn fimm metrar fram um nøsina, so sjálvt um eg kenni vegin og svingini, kundi eg ikki bara storma avstað, tí sýnið var ikki til tað.

**Flytur niður**

Eftir summarfrítíðina flytur Torkil Veyhe til Danmarkar, har hann fer at lesa, men hann ætlar sær kortini ikki at sleppa súkklingini. Tvørturímóti sær hann møguleikar í at súkkla niðri, sum hann kanska ikki hevur í Føroyum.

– Skalt tú gera teg galdandi í teimum stóru kappingunum, mást tú hava súkklingina sum starv burturav, men hjá mær verður tað heldur eitt sindur av súkkling við síðuna av útbúgvingini. Eg vænti kortini, at tað fer at geva eitt sindur, sigur Torkil, ið hevur fleiri avbjóðingar fyri framman.

– Tann størsta her og nú verður at kappast á Oyggjaleikunum á Isle of Wight komandi summar, og so ætli eg mær sjálvandi eisini næsta ár at royna at vinna Statoil Kring Føroyar fyri triðju ferð.

*hilmarjan@sosialurin.fo*




*Tey trý liðini, ið stóðu seg best: HFR úr Íslandi, Team PE úr Føroyum og Wheels of Steel úr Belgia*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Gudmundur væl nøgdur

**SÚKKLING** **Hóast súkklingin bara er ein triðingur av tí, Gudmundur Joensen íðkar sum triathletur, so lá hansara partur sanniliga ikki eftir. Og aftur fyri stríðið fekk hann eitt pláss uppi á sigurspallinum**

**Hilmar Jan Hansen**

Gudmundur Joensen fæst í tí dagliga við fjølbroytta venjing, tí hann bæði svimur, rennur og súkklar. Hann er triathletur og er javnan við í kappingum uttanlands, men hesa vikuna hevur súkklingin staðið fremst á skránni.

– Tað er fantastiskt at kunna koma millum tríggjar teir bestu samanlagt. Í fyrraárið bleiv eg nummar trý og í fjør nummar tvey, so eg mátti royna at spíla meg út, so eg kundi koma upp á sigurspallin aftur hesa ferð, sigur Gudmundur Joensen.

– Eg spenti meg út í dag, tí tað ráddi um at vera við heilt har frammi, skuldi tað eydnast. Eg eri eisini væl nøgdur, sum tað lagaði seg. Gunnar fekk etapuna í dag, Torkil vann samlaðu kappingina og eg fekk bronsu, umframt at vit vunnu liðkappingina, so hetta var bara øgiliga gott.

*hilmarjan@sosialurin.fo*